# skeivt brúktir



*– Fótbóltssambandið átti at tryggjað sær, at pengarnir verða brúktir sum teir skula. Til dømis kundu teir valt, at partvíst lønt ungdómsvenjarum hjá feløgum, um hesir høvdu A-licens. Soleiðis fekk venjarin ta lønina, hann hevur uppiborið, samstundis sum felagið fær vælútbúgvið fólk at taka sær av sínum yngstu kreftum, sum jú skulu mynda felagið seinni, sigur Jákup Mørk*




**Føroyar eru næst vánaligasta landslið í Evropa. Vit hava ikki fingið nakað stig í hvørki EM- ella HM undankapping síðan 2004. Seinastu árini hava vit raplað niður eftir styrkislistanum hjá FIFA. Í løtuni liggja vit nummar 196 – bara 11 lond eru aftan fyri okkum.**

**Sosialurin varpar komandi vikurnar ljós á keðiligu gongdina. Vit leita eftir orsøkunum til, hví tað gongur so illa í hond og spyrja hvat skal til fyri at venda óhepnu gongdini?**

**Lesið sjeynda part í røðini um kreppuna í føroyskum fótbólti.**

– Fótbóltssambandið átti at tryggjað sær, at pengarnir verða brúktir sum teir skula. Til dømis kundu teir valt, at partvíst lønt ungdómsvenjarum hjá feløgum, um hesir høvdu A-licens. Soleiðis fekk venjarin ta lønina, hann hevur uppiborið, samstundis sum felagið fær vælútbúgvið fólk at taka sær av sínum yngstu kreftum, sum jú skulu mynda felagið seinni, sigur Jákup Mørk. Hann undirstrikar, at pengarnir frá bæði UEFA og Fótbóltssambandinum mugu fara til rætta endamálið og á rætta stað.

Jákup Mørk spældi sjálvur fótbólt á hægsta stig í Føroyum fyri 15 árum síðani. Tá vóru so at siga eingir pengar í fótbóltinum. Tað sama kann ikki sigast í dag, men Jákup Mørk metir ikki, at krøvini til leikararnar eru vaksin nevnivert, og als ikki í mun til, hvussu teir verða samsýntir.

– Kappingin er sjálvandi nakað longri nú enn tá, og nøkur feløg venja eina ferð meiri um vikuna. Men annars eru krøvini ikki herd nakað, hóast spælarar fáa fleiri túsund krónur um mánaðin. Og tað er ikki rætt, heldur Jákup Mørk. Eftir hansara tykki áttu feløgini at kunna sett krøv um hvíld og styttri arbeiðsviku, tá lønin er so høg.

– Leikararnir áttu eisini at verið meiri virknir í feløgunum. Til dømis kundu teir verið hjálparvenjari hjá onkrum yngri liðið. Ímyndi tykkum hvønn íblástur og áhuga, tað hevði givið 13 ára gomlum dreingjum, um ein landsliðsleikari hjálpti teimum undir venjing av og á, sigur Jákup Mørk.

– Hetta er tó ikki støðan í dag, ásannar Jákup Mørk, sum heldur at pengarnir verða givnir alt ov lætt út.

## Ikki pláss fyri sereginleikum

Nógv hevur verið tosað og skrivað um ungar leikarar, sum fara til royndarvenjingar ella fáa sáttmála við útlendsk feløg. Enn er tó eingin, sum kemur nær námind Toda Jónsson og tað, hann avrikaði í FC Keypmannahavn. Nær fáa vit aftur ein líknandi leikara at síggja?

– Potentiali til nýggja Toda Jónsson hevur Víkingur. Andreas Lava Olsen hevur nakrar av somu serligu eginleikum, sum Todi Jónsson hevði. Men vit eiga at vera greið um, at tað gongur lang tíð ímillum leikarar við somu evnum sum Todi. Og so mugu vit eisini minnast, at frá tí Todi fór til Danmarkar at spæla fótbólt gingu eini sjey ár, áðrenn hann var á toppinum hjá FCK og millum bestu leikararnar í Danmark, minnir Jákup Mørk á.

Hann leggur síðani aftrat, at gongdin í løtuni onkursvegna tykist at vera tann, at leikarar ikki í sama mun sleppa at menna serligu egineikar sínar.

– Leikarar í dag skulu duga líka væl at verja sum at leypa á. Líka væl at takla sum at skjóta upp á mál. Tað er rákið aðrastaðni, og tað er tað eisini hjá okkum. Tí hava vit í dag bara ein veruligan boksspælara. Tað er Arnbjørn Hansen. Fyri nøkrum árum síðani høvdu vit Súna Fríða Barbá, Kurt Mørkøre og Uni Arge, vísir Jákup Mørk á.

Hinvegin hevur føroyskur fótbóltur fleiri vælútbúnar føroyskar venjarar enn fyri nøkrum árum síðani. Hetta er at fegnast um, sigur Jákup Mørk, sum eisini metir, at vit fara at síggja úrslit av tí arbeiði, hesir nú eru farnir undir.



**8. partur**

**Í blaðnum næsta hósdag verður prátað við Una Arge um sama evni**

